Álit

í

løgtingsmáli nr. 64/2022: Uppskot til løgtingslóg um at umbyggja og útbyggja eftirskúlan Rásina

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð 9. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 15. mars 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við MEGD og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Landsverki og Rásini.

Nevndin fegnast um, at verkætlanin at um- og útbyggja Rásina nú er komin so langt, at arbeiðið fer at byrja seinni í ár.

Uppskotið snýr seg um at víðka og betra um umstøðurnar hjá Rásini. Pláss fer at verða fyri 14 næmingum, sum er ein tvífalding í mun til í dag. Ein industrikøkur verður gjørdur, har pláss er fyri at undirvísa 4-5 næmingum í senn. Vaskirúm har pláss verður fyri at undirvísa 4-5 næmingum í senn. Starvsfólkaumstøðurnar verða betraðar, og tað sama verða undirvísingarmøguleikarnir sum heild.

Byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi vera 25 mió. kr. íroknað prosjektering, ráðgeving og innbúgv.

Undir viðgerðini hevur nevndin fingið greiðu á nøkrum ivamálum, ið komu fram undir 1. viðgerð.

Eitt ivamál snúði seg um, hví verkætlanin ikki hevur sjey nýggj kømur, nú tá næmingatalið veksur við sjey næmingum. Her bleiv upplýst, at talan er um trý dupultkømur og eitt kamar til rørslutarnað.

Nevndin fekk upplýst frá leiðslu skúlans, at tað er vanligt í líknandi skúlum aðrastaðni, at fleiri næmingar eru saman. Tað varð eisini nevnt tað námsfrøðiliga við at læra at vera saman við øðrum.

Ætlanin er at skipa uppihaldið á skúlanum soleiðis, at nýggir næmingar byrja við at hava egið kamar, men sum frálíður fara tey at verða saman tvey og tvey.

Eisini hevur spurningur verið settur um atkomu, og í hesum sambandi varð upplýst, at umframt kamarið til rørslutarnað er eisini lyft ein partur av verkætlanini. Leiðsla skúlans er væl nøgd við ætlaðu útbyggingina.

MEGD hevur eftirlýst ein einsháttaðan samstarvsleist viðvíkjandi hoyringum og fyri, nær og hvussu áhugafeløgini verða tikin inn. Hetta er eftir øllum at døma ymiskt frá einum aðalráði til annað. Nevndin heldur, at leisturin eigur at vera einsháttaður.

Arbeiðið hevur verið boðið út, og tikið er av bíligasta tilboðnum, ið lá eini 12% omanfyri metingina.

Frá 2019 til 2022 eru brúktar 1,7 mió. kr. til fyrireiking og prosjektering. Játtaðar vórðu 4,5 mió. kr. í 2022, harav 4,15 mió. kr. verða fluttar til 2023.

Upplýst er fyri nevndini, at ætlanin er seinkað, við tað at arbeiðstakarin bleiv upptikin av øðrum arbeiði, nú verkætlanin kom í drag. Eftir ætlan byrjar arbeiðið í august, og tí er játtanartørvurin fyri 2023 mettur til uml. 6 mió. kr.

Í sambandi við nevndarviðgerðina av uppskoti til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2023 (lm. 47/2022) valdi nevndin tí at lækka uppskotnu játtanina fyri í ár úr 7,8 mió. kr. niður í 3,8 mió. kr., soleiðis at tøka játtanin í ár íroknað framflytingina frá í fjør á 4,15 mió. kr. verður 7,95 mió. kr.

Nevndin hevur við hesum valt at leggja knappar 2 mió. kr. uppfyri, so at graviarbeiði o.a. kann byrja í summar, um til ber at fáa avtalu í lag um hetta.

Í uppskotinum stendur, at fyri komandi fíggjarár 2024 skulu játtast 11,35 mió. kr., men við broytingini í fíggjarlógaruppskotinum skulu tær 4 mió. kr., ið ikki verða brúktar í ár, og sum tí heldur ikki verða játtaðar, harumframt játtast í komandi fíggjarári ella í 2025.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 28. mars 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	